## Romario bíðar við nummar 1000



Brasilski fótbóltsspælarin, Romario, skeyt um vikuskiftið mál nummar 999 á síni yrkisleið, men nú ætlar hann at bíða við at skjóta mál nummar 1000. Vasco Da Gama spælir um á útivølli ímóti Americano í vikuni, og her hugsar Romario um at sita yvir, tí hann vil skjóta mál nummar 1000 á heimavøllinum, Maracana. Maracana var nevniliga eisini vøllurin, har brasilska fótbóltslegendan, Pelé, skeyt sítt mál nummar 1000. Sunnudagin fær Romario møguleikan at koma uppá tey 1000 málini, tá Vasco Da Gama tekur ímóti Bogafoto á Maracana.

## Føroyar ímóti vandamiklum áleypara

David Healy hjá Norðurírlandi og Lukas Podolski hjá Týsklandi eru toppskjúttar í EM-undankappingini, men ein av mótstøðumonnunum hjá Føroyum mikudagin, er eisini ímillum teir mest vandamiklum í undankappingini. Her er eitt yvirlit yvir bestu toppskjúttarnar.

| | | |
|---|---|---|
| David Healy | Norðurírland | 7 |
| Lukas Posolski | Týskland | 7 |
| Shota Arveladze | Georgia | 5 |
| Eduardo da Silva | Kroatia | 5 |
| Cristiano Ronaldo | Portugal | 5 |

# Óheppin dómaraáseting

**Fyrrverandi altjóða dómarin í hondbólti, Hjalmar Petersen, heldur tað vera óheppið, at tvey pør, sum vera sett í samband við Kyndil, skulu døma allar tríggjar mansfinalurnar í hondbólti, har Kyndil er annar parturin. Hann ásannar tó, at lága dómaratalið er ein trupulleiki**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*- Eg haldi, at dómaraásetingarnar til mansfinaluna eru ógvuliga óhepnar. Tað er keðiligt, at tvey pør, sum vera sett í samband við Kyndil, skulu døma finalurnar, sigur Hjalmar Petersen, fyrrverandi altjóða dómarar*

Um vikuskiftið var fyrsti finaludysturin í manshondbólti á skránni, tá ið Kyndil tók ímóti VÍF. Kyndil vann heimadystin við fimm málum, eftir at teir førdu við 10 málum eitt skifti í seinna hálvleiki.

Eftir dystin hevur tó verið ávís ónøgd um dómaraásetingarnar til tær tríggjar finalurnar. Í dag umboða dómararnir eitt dómarafelag, men av tí at forholdini her á landi eru so smá, so vita tey flestu, at bæði Hannis og Uni Wardum, sum dømdu finaluna sunnudagin, eru gamlir kyndilsmenn. Tað eru Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, sum døma seinnu finaluna, eisini.

Vit hava tikið eitt prát við fyrrverandi altjóða hondbóltsdómaran her á landi, Hjalmar Petersen.

### Óheppið

Hjalmar Petersen heldur tað vera sera óheppið, at dómararfelagið hevur valt tvey pør, sum vera sett í samband við Kyndil, at døma finalurnar.

- Eg haldi, at dómaraásetingarnar til mansfinaluna eru ógvuliga óhepnar. Tað er keðiligt, at tvey pør, sum vera sett í samband við Kyndil, skulu døma finalurnar. Tað er heldur ikki óhugsandi, at hetta kann hava ávirkað fyrireikingarnar hjá vestmenningum.

- Eftir finalurnar sunnudagin havi eg eisini hugsað um, hví man ikki bara hevur býtt um uppá pørini í mans- og kvinnufinaluni. Í vági dømdu Sámal og Kári jú, og um teir dømdu í Havn, so slapp man undan hesum trupulleikanum.

Hjalmar sjálvur hevur altíð verið brennandi neistamaður, men hann sigur seg ongantíð hava dømt Neistan.

- Eg haldi ikki, at eg nakrantíð havi dømt Neistan í bestu deildini. Eg má eisini siga, at tað vildi eg helst sleppa undan.

Hjalmar Petersen ásannar tó, at lága dómaratalið í bestu føroysku deildunum er ein trupulleiki.

- Ein stórur trupulleiki er talið av dómarum. Tað eru ov fá feløg í bestu deildunum, sum hava eitt dómarapar. Um øll feløgini stillaðu við dómarapørum, so var eingin trupulleiki.

### Aðrar dómarar

Hjalmar Petersen var ikki sjálvur til finaluna sunnudagin, men hann hevur tó eina greiða meining undan seinna finaludystinum hjá monnum.

- Um dómarafelagið heldur, at kyndilspørini eru tey einastu, sum kunnu døma mansfinaluna, so skuldu teir verði so mikið at sær komnir, at teir fingu dómarar úr øðrum landi heim at døma seinnu finaluna. So slepst í øllum førum undan einum slíkum trupulleika, sum vit hava nú, sigur Hjalmar at enda.

# Eru væl skikkaði

**Dómararnir til finalurnar vera settir út frá eini heildarmeting. Har innganga fleiri parametur, men ikki hvørjum felagið dómararnir einaferð hava verið atknýttir, sigur Hartvig Joensen, formaður í dómarafelagnum. – Vit hava mett, at hesi dómarapørini vóru, og eru, væl skikkaði at døma dystirnar**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Dómararnir í føroyskum hondbólti eru ikki longur knýttir at nøkrum hondbóltsfelag. Teir umboða dómarafelagið, og tí eiga teir við tíðini at hava møguleika at døma øll liðini í landinum.

Um vikuskiftið dømdu Hannis og Uni Wardum finaluna í manshondbólti ímillum Kyndil og VÍF. Í seinna dystinum skulu Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen døma, meðan Hannis og Uni aftur skulu døma sunnudagin, um tað verður neyðugt við einari triðju finalu. Hetta hevur givið eina ávísa ónøgd serliga í Vestmanna, tí allir hesir hava nevniliga havt eitt tilknýti til Kyndil.

Vit hava tikið eitt prát við formannin í dómarafelagnum, Hartvig Joensen, um ásetingarnar til finalurnar.

### Verður gjørd ein meting

Formaðurin í dómarafelagnum sigur, at ásetingarnar til finalurnar vera gjørdar út frá eini heildarmeting ígjøgnum ári, har dómarafelagið metir um, hvussu tey ymisku pørini eru fyri at døma teir komandi dystirnar.

- Vit meta um, hvussu dómararnir hava klárað seg ígjøgnum árið, og vit hava mett, at hesi bæði dómarapørini hava klárað tað heilt væl í farna kappingarári. Tí hava vit millum annað sett teir at døma finaluna.

- Tað skal eisini líka leggjast afturat, at royndirnar sjálvandi hava nógv at siga, og tað verður ikki so, at vit bara seta eitt par at døma, tí tað er teirra túrur, sigur Hartvig Joensen.

- Tað hevur eisini sera stóran týdning hvussu væl dómararnir klára at tackla strongdar støður. Til finalurnar slepst heldur ikki undan, at vit í dag bert hava eitt føroyskt A-par, ið eigur at klára eina slíka uppgávu væl.

### Skilir trupulleikan

Hartvig Joensen sigur seg væl skilja atfinningarnar frá fólki um dómaraásetingar, um hugsað verður í feløgum.

- Um ein hugsar um hondbóltsfeløg í Føroyum, og hvar hesir ávísu dómararnir hava spælt, so skilji eg væl, at fólk finnast at avgerðina um at seta júst hesar dómararnar. Men teir umboða ikki nakað hondbóltsfelag nú, men eitt dómarafelag, og eg haldi, at fólk mugu byrja at góðtaka dómarafelagið fyrr ella seinni, og ikki hugsa um, hvar teir ávísa dómararnar koma frá.

Hartvig heldur tó ikki, at sjálvar dómaraásetingarnar er størsti trupulleikin. Manglandi talið av dómarum er ein nógv størri trupulleiki, sigur hann.

- Eg haldi, at størsti trupulleikin er lága talið av dómarapørum í Føroyum. Tað er óheppið, at vit ikki hava fleiri dómarar. Eg haldi tað vera alstórum týdningi, at skikkaði dómarapør verða sett við, og ongantíð betri um man kann seta ungar dómarar við. Við hesum høvdu vit haft betri møguleika at hjálpt uppá slíkar trupulleikar, sigur Hartvig at enda.